Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	3. november 2020
Mál nr.:	19/00507
Málsviðgjørt:	ARØ
Eftirkannað:	06. oktober 2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS- lógin) (Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd, hækking av arbeiðsloysisstuðli, eftirlønargjald o.a.)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin)

(Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd, hækking av arbeiðsloysisstuðli, eftirlønargjald o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 12 frá 9. februar 2001, løgtingslóg nr. 79 frá 25. mai 2009, løgtingslóg nr. 46 frá 17. mai 2011, løgtingslóg nr. 45 frá 8. mai 2012, løgtingslóg nr. 71 frá 22. mai 2015, løgtingslóg nr. 129 frá 20. desember 2016, løgtingslóg nr. 25 frá 18. mars 2020 og løgtingslóg nr. 43 frá 7. apríl 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 2 verður orðað soleiðis:

"**§ 2.** Inntøkur grunsins verða útvegaðar við gjøldum frá:

1) Teimum, sum taka ímóti, og teimum, sum rinda:
   a) A-inntøku.
   b) Lønarinntøku, sum ikki er A-inntøka, fyri arbeiði, útint í Føroyum.
   c) Lønarinntøku, sum ikki er A-inntøka, fyri arbeiði, útint í Norðurlandi, og sum sbrt. ásetingum í millumtjóðasáttmála eru sosialt tryggjað í Føroyum.
2) Sjálvstøðugum vinnurekandi, sum hava teknað arbeiðsloysistrygging sbrt. § 12.

3) Persónum, sum hava teknað sjálvbodna arbeiðsloysistrygging sbrt. § 13.”

2. Í § 2 a verður “stovnsins” broytt til: “grunsins”.

3. Í § 3 verður sum stk. 2 sett:
“*Stk. 2.* Samsýningin til stýrislimirnar skal góðkennast av landsstýrismanninum.”

4. § 7 verður orðað soleiðis:

“**§ 7.** Gjaldskyldug til Arbeiðsloysisskipanina eru:
1) allir persónar, sum móttaka inntøku sbrt. § 2, nr. 1, og sum hava fylt 16 ár, men ikki hava nátt fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a., og
2) øll, sum rinda inntøkur sbrt. § 2, nr. 1.

Stk. 2. Persónar, sum sbrt. ásetingum í millumtjóðasáttmála eru sosialt tryggjaðir í øðrum landi, eru undantiknir frá gjaldskyldu.”

5. § 8, stk. 1 verður orðað soleiðis:

“Gjaldið til Arbeiðsloysisskipanina, í hesi løgtingslóg nevnt ALS-gjaldið, verður roknað av øllum inntøkum, sum ásett í § 2, nr. 1, sum tey gjaldskyldugu móttaka ella rinda, tó undantikið:
1) Fólkapensjón og fyritíðarpensjón.
2) Aðrar skattskyldugar almannaveitingar, undantikið:
   a) Endurgjald fyri inntøkumiss sbrt. § 17, stk. 3 í forsorgarlógini.
   b) Ansingarsamsýning fyri at ansa gomlum og óhjálpnum sbrt. § 12 í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
   c) Sjúkradagpengar sbrt. løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.
3) A-inntøka til avmarkaða skattskyldu undir FAS-skipanini og undir FAS-líknandi skipan, sum gevur rætt til afturbering av skatti til reiðaran, um viðkomandi løntakari ikki hevur fastan bústað í Føroyum ella í einum av hinum Norðurlondunum.
4) Tænastumannapensjónir og aðrar líknandi eftirlønir, uppihaldspeningur sbrt. anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ægteskabs indgåelse og opløsning og barnapeningur sbrt. lov om børns retsstilling.”

6. § 8 a verður strikað.

7. § 9, stk. 2, 1. og 2. pkt. verða orðað soleiðis:
“ALS-gjaldið fellur til gjaldingar, samstundis sum tey gjaldskyldugu móttaka ella rinda inntøku sbrt. § 2, nr. 1. Um stýrið tekur undir við ásetingunum, kann landsstýrismaðurin í kunngerð seta aðra gjaldsfreist fyri gjaldskyldug sbrt. § 7, stk. 1, nr. 2 og tey, sum taka ímóti inntøku sbrt. § 2, nr. 1, litra b og c.”

8. Í § 14, stk. 1, nr. 4 verður “67 ár” broytt til: “nátt fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a.”

9. § 15, stk. 1 verður orðað soleiðis:

“Útrokningargrundarlagið er móttikna inntøkan sbrt. § 2, nr. 1 seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn arbeiðsloysið er staðfest. Upp í útrokningargrundarlagið verður ikki roknað:
1) Fólkapensjón og fyritíðarpensjón.
2) Aðrar skattskyldugar almannaveitingar, undantikið:
   a) Endurgjald fyri inntøkumiss sbrt. § 17, stk. 3 í forsorgarlógini.
   b) Ansingarsamsýning fyri at ansa gomlum og óhjálpnum sbrt. §

12 í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
c) Sjúkradagpengar sbrt. løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.

3) A-inntøka til avmarkaða skattskyldu undir FAS-skipanini og undir FAS-líknandi skipan, sum gevur rætt til afturbering av skatti til reiðaran, um viðkomandi løntakari ikki hevur fastan bústað í Føroyum ella í einum av hinum Norðurlondunum.
4) Tænastumannapensjónir og aðrar líknandi eftirlønir, uppihaldspeningur sbrt. anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ægteskabs indgåelse og opløsning og barnapeningur sbrt. lov om børns retstilling."

10. Í § 16, stk. 1, 1. pkt. verður "75%" broytt til: "80%".

11. § 16, stk. 2, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
"Árligi arbeiðsloysisstuðulin er í mesta lagi kr. 222.000 umframt eftirlønargjaldið sbrt. § 17."

12. § 17 verður orðað soleiðis:

"**§ 17**. Arbeiðsleys, sum fáa arbeiðsloysisstuðul, rinda eftirlønargjald sbrt. eftirlønarlógini."

13. Í § 24, stk. 1, 2. pkt. verður "§§ 14 og 21" broytt til: "§§ 14 og 25 a".

14. Í § 26, stk. 1, 1. pkt. verður aftan á "Arbeiðsloysisskipanini" sett: "og Barsilsskipanini".

15. Aftan á § 27 verður sett:

"**§ 27 a.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at upplýsingar skulu skrásetast og sendast Arbeiðsloysisskipanini elektroniskt, og kann áseta nærri reglur um elektroniska samskiftið."

16. Í § 29, stk. 1 verður "hefti" broytt til: "fongsul upp til 4 mánaðir".

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021.
Stk. 2. Orðingin "umframt eftirlønargjaldið sbrt. § 17" í § 1, nr. 11 og § 1, nr. 12 hevur tó virknað frá 1. januar 2019.
Stk. 3. Frá fyrsta útgjaldsskeiði eftir, at løgtingslógin er sett í gildi, verða øll útgjøld til arbeiðsleys og tey, sum verða arbeiðsleys eftirfylgjandi, roknað av nýggjum samsvarandi hesi løgtingslóg.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Lógaruppskotið hevur tríggjar høvuðsorsakir. Hesar eru at fáa ALS-lógina í samsvar við norðurlendska sáttmálan um almannatrygd, at hækka arbeiðsloysisstuðulin og at dagføra ALS-lógina í mun til broytingar í eftirlønarlógini.

Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd

Norðurlond hava ein felags arbeiðsmarknað, og Norðurlond eru eyðkend fyri sínar góðu, sosialu arbeiðsmarknaðarskipanir. Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd hevur ásetingar um lógval; t.v.s., hvørs lands lóggáva skal brúkast, tá ið ein persónur arbeiðir í einum Norðurlandi, men býr í einum øðrum Norðurlandi. Sáttmálin tryggjar javnviðgerð av norðurlendskum ríkisborgarum í mun til nationalu lóggávuna um sosiala trygd í teimum ymisku Norðurlondunum. Hetta merkir, at ein persónur, sum er fevndur av nationalari lóggávu í einum Norðurlandi, hevur somu rættindi og skyldur sambært lóggávuni í einum øðrum Norðurlandi, sum egnu ríkisborgarar landsins. Ein persónur, sum er fevndur av sáttmálanum, kann einans vera fevndur av sosialu lóggávuni í einum Norðurlandi; hetta er vanliga í arbeiðslandinum, men kann í undantaksføri vera í heimlandinum.

Spurningurin um gjaldskylduna til Arbeiðsloysisskipanina hjá løntakarum og arbeiðsgevarum, sum koma undir norðurlendska sáttmálan um almannatrygd, var til viðgerðar í Føroya Rætti á vári 2017. Málið snúði seg um eitt av undantaksførunum, har løntakari hevði fingið undantak frá høvuðsregluni um at rinda sosial gjøld í arbeiðslandinum og tí átti at rinda sosialu gjøldini í Føroyum.

Í dómi í Føroya Rætti frá 15. mai 2017 verður sagt, at gjaldskyldan til Arbeiðsloysisskipanina einans er av A-inntøkum, soleiðis sum hesar eru allýstar í skattalógini. Í verki merkir hetta, at tað einans eru inntøkur, sum verða ávístar umvegis tey av landsstýrismanninum góðkendu avrokningarstøð, sum hava við sær gjaldskyldu til Arbeiðsloysisskipanina. Heimild var sostatt ikki í ALS-lógini til at móttaka ella krevja ALS-gjald av lønini, sum var vunnin í Norra, hóast løntakarin hevði fingið undantak frá at rinda sosial gjøld í Norra.

Av hesi orsøk hevði ein føroysk fyritøka sambært umrødda dómi ikki skyldu til at rinda til Arbeiðsloysisskipanina av lønarinntøkum, sum sambært skattalógini ikki vóru at rokna sum A-inntøkur, hóast løntakarin var fevndur av føroyskari sosialari lóggávu.

Í hesum lógaruppskoti verður skotið upp at broyta ALS-lógina soleiðis, at heimild verður til at taka ímóti gjaldi frá teimum, sum eru fevnd av norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd, og sum sambært ásetingum í sáttmálanum hava skyldu at vera arbeiðsloysistryggjað í Føroyum. Skotið verður upp at gera ta broyting, at gjaldskyldan til Arbeiðsloysisskipanina ikki longur er treytað av, at viðkomandi hevur A-inntøku og fulla skattskyldu til Føroya. Gjaldskyldan verður nú tengd at:

- A-inntøku,
- lønarinntøku, sum ikki er A-inntøka, fyri arbeiði, útint í Føroyum, og
- lønarinntøku, sum ikki er A-inntøka, fyri arbeiði, útint í Norðurlandi, har persónar, sum móttaka slíka inntøku, samsvarandi ásetingum í millumtjóðasáttmála eru arbeiðsloysis-tryggjaðir í Føroyum.

Gjaldskyldan er galdandi fyri tey, sum móttaka og rinda nevndu inntøkur. Tá ið tað ræður um lønarinntøku, verður meint við alt tað, sum er lagt inn í peningi ella peningsvirði í tænastu fyri arbeiðsgevarar.

Hetta lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri teir løntakarar, sum eru búsitandi í Føroyum, og arbeiða í øðrum Norðurlandi, og sum rinda sosialu gjøldini í arbeiðslandinum sambært høvuðsregluni í norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd.

Hækka arbeiðsloysisstuðulin
Í vár varð lógaruppskot lagt fyri Løgtingið um at hækka arbeiðsloysisstuðulin. Uppskotið varð gjørt eftir áheitan frá stýrinum fyri ALS. Men orsakað av serligu umstøðunum við korona og leiklutinum hjá ALS í hesum sambandi varð málið tikið aftur. Orsøkin til fyrra lógaruppskotið var, at fíggjarligu umstøðurnar hjá Arbeiðsloysisskipanini vóru betraðar, og stýrið metti, at grundarlag var fyri at hækka útgjøldini og lækka inngjøldini til Arbeiðsloysisskipanina. Hóast serligu lønarískoytisskipanina, sum var galdandi í vár og í summar fyri at hjálpa privata arbeiðsmarknaðinum ímóti avleiðingunum av korona farsóttini, fer ALS-grunnurin væntandi at hava eitt avlop við árslok í ár. Tí verða broytingarnar í lógaruppskotinum, sum varð tikið aftur í vár, tiknar við í hetta lógaruppskotið.

Skipanin hevur havt vaksandi avlop á hvørjum ári síðan 2014. Við árslok í 2013 var eginognin slakar 307 mió. kr., og við árslok í 2019 var eginognin uml. 910 mió. kr. Í 2014 varð skipanin stillað soleiðis, at um arbeiðsloysið í Føroyum var niðan fyri 4,25%-4,5%, skuldi raksturin av skipanini geva avlop, meðan skipanin kundi hava hall, um arbeiðsloysið fór upp um 4,5%. Á henda hátt varð langtíðarhaldførið hjá skipanini tryggjað. Markið á 4,25% og 4,5% varð valt út frá miðalarbeiðsloysinum árini 1998-2013, eftir at leiðrættað varð fyri tíðarskeið, tá arbeiðsloysið var serliga høgt ella serliga lágt.

Hóast ALS-gjaldið hevur verið óbroytt 1,25% seinastu 8 árini, eru samlaðu árligu inngjøldini vaksin við oman fyri hálvthundrað milliónum krónum síðan 2014, og serliga hesin vøksturin hevur við sær, at arbeiðsloysið kann fara upp um áleið 5,5%, áðrenn raksturin hjá Arbeiðsloysisskipanini fer at geva hall.

Stýrið fyri ALS metir javnan um støddina av ALS-gjaldinum, og avgerandi fyri metingina er, at ALS hevur eina nøktandi eginogn at standa ímóti við undir einari búskaparligari afturgongd. Fatanin er, at tað er í góðum tíðum, at Arbeiðsloysisskipanin skal styrkjast, soleiðis at skipanin er før fyri at standa ímóti einari búskaparligari afturgongd. Í viðmerkingunum til ta fyrstu ALS-lógina stendur: "*at skipanin fíggjarliga skal hvíla í sær sjálvari, soleiðis, at gjøldini verða sett eftir fíggjartørvinum. Tó um farast skal upp um 2%, krevst lógarbroyting, meðan ein lækking kann gerast við eini kunngerð.*" Hetta er síðan broytt, soleiðis at lógarbroyting krevst, um ALS-gjaldið skal vera hægri enn 2,25%.

Stýrið metir, at fíggjarførið hjá skipanini er so mikið gott nú, at skipanin kann standa í móti einum arbeiðsloysi upp á 8% í eini 12 samanhangandi ár og einum arbeiðsloysi upp á 10% í eini 6 ár, áðrenn skipanin verður insolvent. Miðalarbeiðsloysið síðan 1998 hevur verið sløk 4%.

Stýrið fyri ALS heldur, at fíggjarliga treystið hjá skipanini er so mikið gott, og útlitini so fræg, at tað er búskaparliga ráðiligt at lækka inngjaldið við 0,25% stigum, úr 1,25% niður í 1%. Hetta verður gjørt við broyting í kunngerð nr. 136 frá 3. november 2009 um ALS-gjald, samstundis sum hetta lógaruppskotið kemur í gildi.

Útgjaldið úr Arbeiðsloysisskipanini er ikki broytt síðan 2012, og stýrið mælir til at hækka útgjaldsloftið úr 17.500 kr. um mánaðin upp í 18.500 kr. um mánaðin og at hækka útgjaldsprosentið úr 75% upp í 80%.

Víst verður til skrivið frá stýrinum fyri ALS til landsstýrismannin í fylgiskjali 2.

Eftirløn av arbeiðsloysisstuðli
Sum ein partur av pensjónsnýskipanini varð eftirlønarlógin broytt 1. januar 2019. Hendan broytingin hevði við sær, at útgjald úr Arbeiðsloysisskipanini ikki longur er undantikið tvungna eftirlønargjaldinum. Tískil verður ALS-lógin broytt samsvarandi.

Annað
Landsstýrið hevur sett sær fyri at minka um talið á almennum nevndum og ráðum. Skotið verður upp at leggja kærunevndirnar hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini saman í somu kærunevnd.

Eisini verða aðrar broytingar gjørdar í lógini. M.a. verður ásett, at samsýningin til stýrislimirnar skal góðkennast av landsstýrismanninum, og í samband við rættindi og skyldur sambært lógini verður fólkapensjónsaldur sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. nýttur í staðin fyri aldursmarkið á 67 ár. Harafturat fær landsstýrismaðurin heimild at áseta reglur um talgilt samskifti.

Lógaruppskotið er í høvuðsheitum gjørt eftir áheitan frá stýrinum fyri ALS.

1.2. Galdandi lóggáva
ALS-lógin og norðurlendski sáttmálin um almannatrygd
ALS-lógin ásetur, at allir persónar, sum móttaka A-inntøku, og sum hava fulla skattskyldu í Føroyum, sum hava fylt 16 ár, men ikki 67 ár, og øll, sum rinda A-inntøku í Føroyum, eru gjaldskyldug til Arbeiðsloysisskipanina.

Við støði í omanfyri nevnda dómi í Føroya Rætti og harvið staðfesta ósamsvari millum ALS-lógina og norðurlendska sáttmálan um almannatrygd er tørvur á at fáa neyðugu heimildirnar til vega í ALS-lógini.

Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd byggir á tríggjar ES-fyriskipanir (nr. 883/2004, nr. 987/2009 og nr. 1231/2010), ið eru partur av lógargrundarlagnum undir fyrisitingini av føroysku arbeiðsloysisskipanini og allari føroyskari lóggávu um sosiala trygging. Sambært hesum reglum skulu øll sosial gjøld, herundir m.a. arbeiðsloysistrygging, rindast í arbeiðslandinum. Limalondini kunnu tó sambært art. 16 í ES-fyriskipan nr. 883/2004 avtala undantøk "*til fordel for visse personer eller visse personkategorier*." Við støði í hesi áseting eru gjørdar tvílandaavtalur millum Føroyar og Norra, ið loyva ávísum yrkisbólkum,[1] ið arbeiða í Norra, at søkja um at fáa undantøku at rinda sosial gjøld til norsku skipanina. Ein fyritreyt fyri, at slík umsókn kann verða gingin á møti, er, at øll lógarásett sosial gjøld verða rindað í Føroyum. Tað ber eisini til at játta undantøku, hóast ongin tvílandaavtala fyriliggur.

[1] Hesir bólkar eru føroyskir fiskimenn á norskum fiskiskipum, føroysk sjófólk á norskum seismikk- og supplyskipum og føroyskir handverkarar, sum arbeiða í Norra.

T.d. kann NAV í Norra (Arbeids- og velferdsforvaltninga) játta føroyskum heilsustarvsfólki undantøku, hóast ongin tvílandaavtala millum Føroyar og Norra fyriliggur fyri hendan yrkisbólk.

Sambært norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd eigur tað at vera møguligt hjá føroyskum arbeiðstakarum, sum móttaka B-inntøku, og sum eru fevndir av sáttmálanum, at vera arbeiðsloysistryggjaðir í Føroyum, um avtala er gjørd um tað. Sum nú er, er tó ikki heimild í ALS-lógini til at krevja ALS-gjald av B-inntøku. Sum nú er, er heldur ikki møguleiki hjá norðurlendingum, sum arbeiða í Føroyum, at sleppa undan at rinda ALS-gjald, hóast teir, eftir avtalu sambært norðurlendska sáttmálanum, kundu valt heldur at vera almannatryggjaðir í heimlandinum.

§ 1 í kunngerð um sjálvbodna arbeiðsloysistrygging fyri løntakarar er soljóðandi: "Rætt til at tekna trygging hava persónar, sum hava inntøku frá útlendskum arbeiðsgevara, ið ikki er A-inntøka, og sum annars lúka treytirnar í løgtingslóg nr. 113 frá 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, við seinni broytingum, um so er, at inntøkan eftir skattalógini hevði verið A-inntøka, um arbeiðsgevarin hevði heimating her á landi." ALS noktaði persóni, búsitandi í Føroyum, sum hevði inntøku frá norskum arbeiðsgevara, at tekna sjálvbodnu arbeiðsloysis-tryggingina m.a. vísandi til, at persónurin sambært norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd átti at vera arbeiðsloysistryggjaður í Norra. Hesa avgerðina broytti Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini 9. juli 2018. Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini metti, at persónurin leyk allar treytirnar fyri at tekna sjálvbodna arbeiðsloysistrygging fyri løntakarar, og harvið hevði persónurin rætt til at tekna sjálvbodna trygging.

Avgerðin hjá Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini hevur við sær, at arbeiðstakarar, sum arbeiða í Norra, men búgva í Føroyum, kunnu fáa undantak frá at rinda til NAV í Norra, tí teir rinda fyri sjálvbodna arbeiðsloysistrygging í Føroyum. Trupulleikin við hesum er, at ALS er ein solidarisk skipan, sum bæði arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar gjalda til. Við sjálvbodnu tryggingini fyri løntakarar er tað bara arbeiðstakarin og ikki arbeiðsgevarin, sum rindar inn í skipanina.

Tað er ásett í art. 21, stk. 1 í ES fyriskipan nr. 987/2009, at arbeiðsgevarin, sum hevur heimstað ella handilsstað uttan fyri tað málføra limalandið, skal halda tær skyldur, sum eru ásettar í lóggávuni, sum er galdandi fyri arbeiðstakaran, sum um viðkomandi hevði heimstað ella handilsstað í tí málføra limalandinum; hetta inniber m.a. at rinda tey gjøld, sum eru ásett í lóg. Hetta merkir, at um arbeiðstakari, búsitandi í Føroyum og arbeiðir í Norra, sambært tvílanda avtalu við støði í norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd hevur valt at vera sosialt tryggjaður í Føroyum, eru Føroyar tað málføra limalandið, og harvið verður arbeiðstakarin fevndur av føroyskari lóggávu. Sambært art. 21, stk. 1 í ES fyriskipan nr. 987/2009 skal norski arbeiðsgevarin í hesum føri halda tær skyldur, sum fylgja av føroyskari lóggávu. Trupulleikin er, at heimild er ikki í ALS-lógini til at móttaka ALS-gjald frá norska arbeiðsgevaranum og heldur ikki frá føroyska arbeiðstakaranum. Føroyski arbeiðstakarin kann tekna eina sjálvbodna arbeiðsloysistrygging, og harvið verður inngjaldið til Arbeiðsloysisskipanina skeiklað, tí arbeiðsgevaragjaldið manglar.

Í grundini er hendan mannagongdin, at arbeiðstakarin einsamallur kann rinda inn í eina sjálvbodna skipan, har tað annars er tvungið fyri bæði arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar at rinda inn, grundarlag fyri, at sosial dumping kann fara fram. Allir arbeiðsgevarar og allir løntakarar hava skyldu at rinda fyri arbeiðsloysistrygging hjá arbeiðstakaranum. Soleiðis eru skipanirnar bæði í Norra og í Føroyum.

Tí eigur lóggávan í Føroyum at verða broytt soleiðis, at okkara góðu arbeiðsmarknaðarskipanir eisini rigga, tá ið føroyski arbeiðstakarin fer í onnur Norðurlond at arbeiða, og tá ið norðurlendingar koma til Føroyar at arbeiða. Tað er bæði galdandi fyri rættindini hjá ferðandi arbeiðstakarunum og fyri skyldurnar hjá bæði arbeiðstakarum og arbeiðsgevarum.

Arbeiðsloysisstuðulin og ALS-gjaldið
Sum ALS-lógin er nú, er arbeiðsloysisstuðul pr. dag 75% av tí í § 15 nevnda útrokningargrundarlagi, býtt við 253. Árligi arbeiðsloysisstuðulin er í mesta lagi 210.000 kr. Tað vil siga, at arbeiðsloysisstuðulin í mesta lagi kann vera (210.000/12) 17.500 kr. um mánaðin. Hesar upphæddir vórðu ásettar í lógina í 2012; í eini tíð, har neyðugt var við átøkum, fyri at skipanini skuldi vera lív lagað. Við gongdini, sum byrjaði í 2010, bar man í 2012 ótta fyri, at eginognin hjá ALS fór at verða burtur í 2014, um átøk ikki vórðu sett í verk. Tað var ein herskin biti hjá øllum pørtum at økja um inngjøldini og minka útgjøldini.

Síðan 2014 hevur skipanin givið vaksandi avlop á hvørjum ári, og eins og ætlanin var, hevur skipanin konsoliderað seg, nú tíðirnar hava verið góðar.

Útgjaldið úr Arbeiðsloysisskipanini er ikki broytt síðan 2012, og stýrið mælir til at hækka útgjaldsloftið úr 17.500 kr. um mánaðin upp í 18.500 kr. um mánaðin og at hækka útgjaldsprosentið úr 75% upp í 80%.

Í kunngerð nr. 136 frá 3. november 2009 um ALS-gjald er ásett, at inngjaldið til Arbeiðsloysisskipanina er 1,25%. Hetta gjaldið hevur verið óbroytt síðan 2011. Gjaldið verður kravt av gjaldsgrundarlagnum hjá teimum gjaldskyldugu. Ætlanin er at broyta kunngerðina, soleiðis at ALS-gjaldið lækkar við 0,25% stigum til 1%, samstundis sum hetta lógaruppskotið kemur í gildi.

Eftirlønarlógin
1. januar 2019 varð eftirlønarlógin broytt. Broytingarnar høvdu m.a. við sær, at útgjald úr Arbeiðsloysisskipanini ikki longur varð undantikið bundna eftirlønargjaldinum. Sí løgtingslóg nr. 69 frá 30. apríl 2018 um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin) (Pensjónsnýskipan) og løgtingsmál 69/2017 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin) (Pensjónsnýskipan). ALS-lógin hevur onga áseting um eftirlønargjald, men av tí at Løgtingið samtykti, at arbeiðsloysisstuðul skuldi verða eftirlønargevandi, hevur Arbeiðsloysisskipanin rindað eftirløn av arbeiðsloysisstuðli síðan 1. januar 2019. Tørvur er á ásetingum um eftirløn í ALS-lógini.

Samsýningin til stýrislimirnar
Sambært § 4, stk. 5 í ALS-lógini ásetir stýrið í starvsskipan greiniligar reglur fyri starvið. Í hesi starvsskipan er ásett, hvør samsýningin til stýrislimirnar er. Skotið verður upp, at samsýningin skal góðkennast av landsstýrismanninum.

Aldursmarkið í ALS-lógini
Fyri at vera fevnd av ALS-lógini skulu persónar hava fylt 16 ár, men ikki 67 ár. Skotið verður upp, at aldursmarkið heldur skal fylgja fólkapensjónsaldrinum í løgtingslóg um almannapensjónir o.a., soleiðis at rættindir og skyldur, ið fylgja av ALS-lógini, halda uppat, tá ið persónar fáa rætt til pensjón sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

Óneyðugar ásetingar um umsókn

Útgangsstøðið í § 8 í ALS-lógini er, at ALS-gjald verður roknað av øllum A-inntøkum, sum tey gjaldskyldugu fáa ella rinda. Tó eru nakrar A-inntøkur, sum eru undantiknar frá gjaldskylduni. Ásett er í § 8, stk. 1, nr. 4 og í § 8 a í ALS-lógini, at ALS-gjald ikki skal rindast av tænastumannapensjónum og øðrum líknandi eftirlønum, uppihaldspeningi sambært hjúnabandslógini og barnapeningi sambært lóg um rættindi barnanna, um søkt verður um undantak frá gjaldskylduni. Sama er galdandi fyri hægstu fyritíðarpensjón eftir løgtingslóg um almannapensjónir, sambært § 7, stk. 2 í ALS-lógini. Hóast hetta fáa nevndu persónar frítøku uttan at senda inn umsókn. Hetta er orsakað av, at Gjaldstovan og Almannaverkið stýra teimum útgjøldunum við serligum V-tølum, ið verða nýtt til útgjøld av ikki gjaldskyldugum veitingum. Umsóknir verða sostatt ikki nýttar til at fáa frítøku frá at rinda ALS-gjald av umtalaðu veitingum. Kravið um umsókn eigur tískil at verða strikað fyri at fáa samsvar við veruligu umsitingina.

Kærunevndin
Avgerðir, sum Arbeiðsloysisskipanin hevur tikið viðvíkjandi arbeiðsloysi, kunnu kærast til kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini. Kærunevndin hevur tríggjar limir, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi arbeiðsgevarar og ein formann, ið skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir av landsstýrinum fyri 4 ár í senn, tó so at nevndarlimur verður sitandi, til nýggjur er valdur. Kærunevndin hjá Barsilsskipanini hevur í høvuðsheitum somu treytir, og í praksis er talan um somu persónar, sum eru valdir í báðar nevndirnar. Endamálið við broytingini er sostatt formliga at leggja nevndirnar saman.

Talgilt samskifti
Ongin áseting er í ALS-lógini um talgilt samskifti.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Lógaruppskotið hevur hesi endamál:
- at fáa ALS-lógina at samsvara við norðurlendska sáttmálan um almannatrygd
- at hækka arbeiðsloysisstuðulin
- at fáa ALS-lógina at samsvara við eftirlønarlógina
- at landsstýrismaðurin skal góðkenna samsýningina til limirnar í stýrinum fyri ALS
- at broyta 67 ára aldursmarkið til at fylgja fólkapensjónsaldrinum
- at strika óneyðugar ásetingar um umsókn
- at leggja kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini og kærunevndina hjá Barsilsskipanini saman
- at heimila landsstýrismanninum at áseta reglur um talgilda fráboðan og samskifti

Eisini verður skotið upp at gera aðrar smærri broytingar av tekniskum slagi.

At fáa ALS-lógina at samsvara við norðurlendska sáttmálan um almannatrygd
Fyrsta endamálið við lógaruppskotinum er at nágreina gjaldskylduna til Arbeiðsloysis-skipanina, tá ið tað snýr seg um tey, sum koma undir norðurlendska sáttmálan um almannatrygd. Hetta fer m.a. at hava við sær, at føroyingar, ið arbeiða í øðrum Norðurlandi, kunnu verða arbeiðsloysistryggjaðir í Føroyum eftir undantaksregluni í ES-fyriskipan 883/2004, og at norðurlendingar, ið starvast í Føroyum, kunnu verða undantiknir gjaldskyldu til ALS, um teir eru almannatryggjaðir í heimlandinum.

At hækka arbeiðsloysisstuðulin

Útgjaldið úr Arbeiðsloysisskipanini er ikki broytt síðan 2012, og stýrið mælir til at hækka útgjaldsloftið úr 17.500 kr. um mánaðin upp í 18.500 kr. um mánaðin og at hækka útgjaldsprosentið úr 75% upp í 80%.

At fáa ALS-lógina at samsvara við eftirlønarlógina
1. januar 2019 kom pensjónsnýskipanin í gildi; tað hevði m.a. við sær, at arbeiðsloysisstuðul ikki longur er undantikin tvungnum eftirlønargjaldi. Tí eigur ALS-lógin at verða broytt, soleiðis, at tað verður greitt, at eftirlønargjald verður rindað av arbeiðsloysisstuðli. Fyri at gera tað greitt, at eftirlønargjaldið ikki skal dragast frá arbeiðsloysisstuðlinum, men leggjast omaná, verður tað ásett, at árligi arbeiðsloysisstuðulin í mesta lagi er 220.000 kr. umframt eftirlønargjaldið.

At landsstýrismaðurin skal góðkenna samsýningina til limirnar í stýrinum fyri ALS
Av tí at Arbeiðsloysisskipanin er regulerað í lóg, og stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina verður valt av landsstýrismanninum, verður skotið upp, at samsýningin til stýrislimirnar skal góðkennast av landsstýrismanninum.

At broyta 67 ára aldursmarkið til at fylgja fólkapensjónsaldrinum
Ásett er í løgtingslóg um almannapensjónir o.a., at fólkapensjónsaldurin hækkar úr 67 árum upp í 67 ½ ár og síðan 68 ár. Fyri at tað ikki skal vera neyðugt leypandi at broyta aldursmarkið í ALS-lógini, verður ásett, at aldursmarkið fylgir fólkapensjónsaldrinum, sum hann er ásettur í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

At strika óneyðugar ásetingar um umsókn
Í ALS-lógini eru ásetingar um, at ALS-gjald ikki skal rindast av tænastumannapensjónum o.ø., um umsókn verður latin Arbeiðsloysisskipanini um frítøku frá at rinda ALS-gjald. Í roynd og veru verður ALS-gjald als ikki rindað av tænastumannapensjónum o.ø. Tað er ikki neyðugt hjá fólki at søkja um undantøku, tí at Gjaldstovan og Almannaverkið stýra teimum útgjøldunum við serligum V-tølum, ið verða nýtt til útgjøld av ikki gjaldskyldugum veitingum. Fyri at fáa samsvar millum lóg og veruleika verða ásetingarnar um umsóknir tí strikaðar.

At leggja kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini og kærunevndina hjá Barsilsskipanini saman
Sum liður í ætlanini hjá landsstýrinum at minka talið av almennum nevndum og ráðum, verður skotið upp at leggja kærunevndirnar hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini saman til eina kærunevnd.

At heimila landsstýrismanninum at áseta reglur um talgilda fráboðan og samskifti
Tað krevur heimild í løgtingslóg, um tað skal vera kravt av borgara ella fyritøku, at tey skulu samskifta við almennar myndugleikar elektroniskt ella talgilt. Í sambandi við menningina av Talgildu Føroyum, verður helst neyðugt at hava slíka heimild í ALS-lógini. Tí verður skotið upp, at landsstýrismaðurin fær heimild til at áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Uppskotið hevur við sær, at ALS-lógin verður broytt, soleiðis at hon verður í samsvari við norðurlendska sáttmálan um almannatrygd og pensjónsnýskipanina, umframt at arbeiðsloysisstuðulin hækkar. Nýskipanin er, at gjaldskyldan til Arbeiðsloysisskipanina ikki longur er tengd at fullari skattskyldu til Føroyar, men verður tengd at A-inntøku og lønarinntøku fyri arbeiði, útint í Føroyum. Harafturat verður heimilað teimum, ið móttaka

lønarinntøku úr einum øðrum Norðurlandi og búgva í Føroyum, at verða arbeiðsloysistryggjað hjá ALS, um tey ynskja tað, og um tað er loyvt sambært tvílandaavtalu sambært norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd.

Við uppskotinum verður hægst møguligi mánaðarligi arbeiðsloysisstuðulin hækkaður úr 17.500 kr. upp í 18.500 kr., og arbeiðsloysisstuðulin pr. dag verður broyttur frá 75% av útrokningargrundarlagnum til 80% av útrokningargrundarlagnum.

Harumframt verður arbeiðsloysisstuðul eftirlønargevandi við tað, at ALS rindar tvungna eftirlønargjaldið sambært eftirlønarlógini á eftirlønarkontu hjá arbeiðsleysum, ið móttaka arbeiðsloysisstuðul. T.v.s., at arbeiðsloysisstuðulin, ið kemur á konto hjá arbeiðsloysis-tryggjaðum, ikki verður minni aftan á lógarbroytingina, men at ALS umframt arbeiðsloysis-stuðulin eisini rindar til tvungna eftirløn hjá tí arbeiðsloysistryggjaða, ið móttekur arbeiðsloysisstuðul. Arbeiðsloysisstuðul hevur í veruleikanum verið eftirlønargevandi síðan 1. januar 2019.

Skotið verður upp, at samsýningin til limirnar í stýrinum fyri ALS skal góðkennast av landsstýrismanninum, og at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um talgilda fráboðan og samskifti. Harumframt verður skotið upp at gera ymiskar broytingar av tekniskum slagi.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Viðvíkjandi ásetingunum um eftirløn í § 1, nr. 12 og 13 verður víst til ummælini í løgtingsmáli nr. 69/2017.

Umframt at uppskotið varð lagt á heimasíðuna hjá Føroya landsstýri og Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, varð uppskotið sent til hesar partar til hoyringar:

Akademikarafelagið, Almannamálaráðið, Almannaverkið, ALS, Áhugafelagið Antares, Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya, Fakfelag Sjómansskúlalærara í Føroyum, Fakfelagssamstarvið, Faroe Offshore Service, Farmakonomforeningen, FAS, Felagið Maskinmeistaralærarar, Fiskimálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Fysioterapeutfelag Føroya, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Ergoterapeutfelag, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Handverkarafelag, Føroya Kærustovnur, Føroya Musiklærarafelag, Føroya Prentarafelag, Føroya Reiðarafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Føroya Tekniska Lærarafelag, Føroysk Miðlafólk, Grafiska Yrkisfelagið, Havnar Arbeiðarafelag, Havnar Handverkarafelag, Heilsumálaráðið, Heilsurøktarafelagið, HK Stat Føroya Deild, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, Kommunulæknafelag Føroya, Kost- og Føðslufelagið, Landsfelag Handverkaranna, Ljósmøðrafelag Føroya, Løgmansskrivstovan, Magistarafelag Føroya, Maskinmeistarafelagið, Meginfelag Útróðrarmanna, PAM Offshore Service, Prestafelag Føroya, S&K Felagið, Samtak, Serlæknafelag Føroya, Sjóvinnustýrið, stýrið fyri ALS, TAKS, Tænastumannafelagið, Uttanríkis- og mentamálaráðið, Útlendingastovan, Yngri Læknar, Yrkisfelag teirra, ið starvast í tryggingar-, fíggjar-, KT o.l. fyritøkum og Yrkisfelagið Miðnám.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur fingið hoyringarskriv frá:
Almannaverkinum, Antares, Faroe Offshore Service, Fiskimálaráðnum, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Skipara- og navigatørfelag, Heilsuhjálparafelagnum, Heilsumálaráðnum, Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, Maskinmeistarafekagnum, PAM Offshore Service, Samtak og Sjóvinnustýrinum/FAS.

Almannamálaráðið, **Almannaverkið**, **Fiskimálaráðið**, **Føroya Arbeiðsgevarafelag**, **PAM Offshore Service** og **Sjóvinnustýrið/FAS** høvdu ongar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Niðanfyri er ein gjøgnumgongd av innkomnu hoyringarsvarunum. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur gjørt viðmerkingar til einstøku hoyringarsvarini, har tað hevur verið mett neyðugt.

Antares hevur viðmerkingar til ymiskar partar av lógaruppskotinum.

Viðvíkjandi uppskotinum til nýggju § 2, nr. 1, litra c: "Lønarinntøku, sum ikki er A-inntøka, fyri arbeiði, útint í Norðurlandi, og sum sbrt. ásetingum í millumtjóðasáttmála eru sosialt tryggjað í Føroyum." Felagið heldur, at tað tykist ógreitt í almennu fyrisitingini, hvør er sosialt tryggjaður í øðrum Norðurlandi og harvið ikki sosialt tryggjaður í Føroyum. Tí eigur hetta hugtakið at verða allýst.

Viðvíkjandi uppskotinum til nýggja áseting í § 7, stk. 2: "Stk. 2. Persónar, sum sbrt. ásetingum í millumtjóðasáttmála eru sosialt tryggjaðir í øðrum landi, eru undantiknir frá gjaldskyldu." Felagið slær fast, at tað er er sera umráðandi, at tað er púra greitt fyri umsitingini og borgarum, hvør kemur undir hesa áseting, tí í fleiri ár hevur eitt satt eljustríð verið um hetta millum borgarar og fyrisitingina. Harafturat er umráðandi, at leiðreglur og mannagongdir fyri undantøk verða gjørd, áðrenn møguligar lógarbroytingar fáa gildi. Felagið hevur sæð í líknandi skipanum, at tilgongdin er tilvildarlig, og at tað kann taka ár at koma fram til eina viðgerð av umsóknum, ið ikki tekur ovurhonds nógva tíð og orku. Harumframt má eisini vera ein mannagongd og ein leiðregla um, hvussu søkjast skal, hvat skal skjalprógvast, og hvørji krøv skulu lúkast.

Antares vísir á, at tað er ein sannleiki við fyrivarnum, tá ið tað í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur, at føroyingar kunnu fáa frítøku frá gjaldi til sosialu skipanina í Noregi. Felagið vísir á, at tað sjáldan verður hildið at vera ein fyrimunur at søkja um frítøku frá at gjalda limagjald til Folketrygd. T.d. er útgjald til eftirlønir, ið eisini er tengt at limagjaldinum, væl størri í Norra enn í Føroyum. Harafturat førir tað ofta til uppsøgn, um søkt verður um frítøku frá at gjalda limagjald til Folketrygd, tí tað áleggur arbeiðsgevarum skyldur, ið fáir teirra eru sinnaðir at átaka sær. Antares heldur, at lóggevarar eiga at vera varnir við at máa støðið undan at føroyingar kunnu vera tryggjaðir í arbeiðslandinum. Antares samanber hetta lógaruppskotið við broytingar, ið vórðu framdar í eftirlønarlógini áleið 2012-13, har tað eisini varð róð fram undir at áleggja donskum arbeiðsgevarum skyldur í eftirlønarlógini. Tá ásannaði Fíggjarmálaráðið, at tað ikki bar til at lóggeva fyri útlendskar borgarar og fyritøkur í útlandinum og gekk frá hesum. Antares heldur at sama man vera galdandi enn og tí eisini er galdandi fyri ALS-lógina. Víst verður til fylgiskjal 3.

Viðmerking frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum:
Viðvíkjandi nýggju ásetingini í § 2, nr. 1, litra c: Viðvíkjandi spurninginum, um hvør er sosialt tryggjaður í øðrum Norðurlandi og harvið ikki sosialt tryggjaður í Føroyum, skal Umhvørvis- og vinnumálaráðið vísa á, at útgangsstøðið er, at løntakarar eru sosialt tryggjaðir í landinum, har teir arbeiða. Hetta er høvuðsreglan í norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd. Arbeiðir ein løntakari, búsitandi í Føroyum, í t.d. Norra, er hesin fevndur av norskari sosialari lóggávu. Ásetingin í nýggju § 2, nr. 1, litra c er einans viðkomandi fyri føroyskar løntakarar, ið arbeiða í Norra, um hesir eru fevndir av tvílandaavtalu millum NAV og Almannaverkið, sum ásetur, at viðkomandi løntakarar skulu vera fevndir av sosialu lóggávuni í Føroyum. Fyriliggur ongin avtala um hetta millum NAV og Almannaverkið, er løntakari, búsitandi í Føroyum, ið

arbeiðir í Norra, ikki fevndur av ALS-lógini. Almennu viðmerkingarnar eru broyttar nakað fyri at gera hetta greiðari.

Viðvíkjandi nýggju ásetingini í § 7, stk. 2: Ásetingin snýr seg um, at tey, ið eru arbeiðsloysistryggjað í øðrum landi, eru undantikin frá gjaldskyldu til ALS. Taka vit dømi um ein løntakara, búsitandi í Føroyum, sum arbeiðir í einum øðrum Norðurlandi, so er hesin sosialt tryggjaður í arbeiðslandinum sambært norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd, sum er ein millumtjóðasáttmáli, og løntakarin er harvið undantikin at rinda til ALS, um annað ikki er avtalað. Taka vit eitt hugsað dømi um ein løntakara, búsitandi í Norra, sum arbeiðir í Føroyum, er hesin sambært høvuðsregluni í norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd fevndur av sosialu lóggávuni í Føroyum og skal harvið rinda ALS-gjald eins og onnur, ið arbeiða í Føroyum. Men um so varð, at NAV og Almannaverkið gjørdu eina avtalu, sum frítók henda løntakaran frá at rinda sosial gjøld í Føroyum, verður slík avtala avgerandi fyri, at viðkomandi løntakari framvegis er fevndur av norskari sosialari lóggávu og ikki hevur skyldu at rinda til ALS. Nýggja ásetingin í § 7, stk. 2 er í veruleikanum makin (pendant) til nýggju ásetingina í § 2, nr. 1, litra c. Ásetingin heimilar, at persónar, sum búgva í øðrum norðurlondum, men arbeiða í Føroyum, og sum eru fevndir av undantaksregluni í norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd, sleppa undan at rinda til ALS, um teir rinda arbeiðsloysistrygging í heimlandinum. Aftur her er tað avtalan millum NAV og Almannaverkið, sum verður brúkt sum grundarlag fyri at frítaka ein løntakara frá at rinda til ALS, sum sambært høvuðsregluni í norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd annars átti at rinda til ALS.

Viðvíkjandi hinum viðmerkingunum hjá Antares skal Umhvørvis- og vinnumálaráðið gera tað heilt greitt, at hetta lógaruppskotið ikki máar støðið undan, at føroyingar arbeiða í øðrum Norðurlondum. Hetta lógaruppskotið ger, at heimild verður í ALS-lógini bæði at fylgja høvuðsreglu og undantaksreglu í norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd. Hetta lógaruppskotið hevur onga ávirkan á teir løntakarar, sum búgva í Føroyum og arbeiða í øðrum Norðurlandi, og sum eru fevndir av sosialu lóggávuni í arbeiðslandinum. Harafturat fylgir tað av norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd, at skyldan hjá arbeiðsgevaranum fylgir skylduni hjá løntakaranum; er løntakarin fevndur av føroyskari sosialari lóggávu, er arbeiðsgevarin tað somuleiðis. Víst verður til kapittul *1.2. Galdandi lóggáva*, har tað á s. 7 stendur um skylduna hjá arbeiðsgevarum.

Faroe Offshore Service saknar eina nágreining av, hvat lønarinntøka er og sær fleiri vansar við uppskotinum. Mett verður, at ásetingarnar um, at útlendskur løntakari, sum ger arbeiði í Føroyum fyri ein útlendskan arbeiðsgevara, fara at vera sera truplar at umsita. Spurnartekin verður sett við, um lønarinntøka fyri viðlíkahaldsarbeiði umborð á føroyskum skipi, sum liggur á skipasmiðju í t.d. Singapore, er gjaldskyldug til ALS. Mælt verður frá at brúka hugtakið "lønarinntøka", men heldur "A-inntøka" og "skattskyldug inntøka". Víst verður á, at viðgerðartíðin fyri undantøkur er sera long, og við uppskotinum økist umsiting og eftirlit av undantøkum. Spurnartekin verður sett við týdningin av § 2, nr. 2, har tað stendur: "teimum, sum rinda inntøkur, sum nevndar í nr. 1"; er talan um arbeiðsgevara ella annað? Spurningur verður settur við, hvussu ALS skal umsita innkrevjing frá útlendskum arbeiðsgevarum av inntøkum, sum ikki eru A-inntøka. Gjørt verður vart við, at um ætlanin bert er at krevja útlendska arbeiðsgevaran eftir ALS-gjaldi í teimum førum, har umboðsmaður/millummaður hevur heimating í Føroyum, verður gjørdur munur á arbeiðsgevarum, sum hava umboð í Føroyum, og teimum, sum ikki hava umboð í Føroyum. Eisini kundi Faroe Offshore Service hugsað sær at vita, hvussu ALS ætlar at umsita innkrevjing frá útlendskum arbeiðsgevarum. Víst verður til fylgiskjal 4.

Viðmerking frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum:
Orsøkin til, at hugtakið "lønarinntøka"verður nýtt aftur at hugtakinum "A-inntøka", er, at A-inntøka ikki fevnir um inntøku hjá øllum persónum, sum sbrt. norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd eiga at rinda sosial gjøld í Føroyum. Sambært lógaruppskotinum er lønarinntøka alt tað, sum er lagt inn í peningi ella peningsvirði í tænastu fyri arbeiðsgevarar. Hetta er nú sett í viðmerkingarnar í kapittul *1.1. Orsakir til uppskotið* og til serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 1 í kapittul 3.1.

Víst verður á, at uppskotið er ikki neyvt tað sama, sum varð lagt fram í 2018. Tí verður gingið út frá, at Faroe Offshore Service meinar við nýggju ásetingina í § 2, nr. 1, sum snýr seg um tey, ið móttaka, og tey, ið rinda lønarinntøkur o.a. Talan er her um arbeiðsgevarar, ið rinda løn. Ætlanin er ikki bara at krevja útlendska arbeiðsgevaran eftir ALS-gjaldi í teimum førum, har umboðsmaður/millummaður hevur heimating í Føroyum. Tá ið talan er um føroyingar, ið arbeiða í øðrum Norðurlandi, og sum sbrt. millumlandaavtalu sbrt. norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd hava valt at vera tryggjaðir í Føroyum, er tað óviðkomandi fyri gjaldskylduna til ALS, um ein millummaður er, ið hevur heimating í Føroyum. Sambært art. 21 í ES-fyriskipan nr. 987/2009 skal ein arbeiðsgevari, sum hevur heimstað ella vinnustað uttan fyri málføra limalandið (den kompetente medlemsstat), lúka allar tær skyldur, sum eru ásettar í lóggávuni, ið er galdandi fyri arbeiðstakaran. Gjaldið frá teimum, sum eru fevnd av nýggju § 2, nr. 1, litra c, verður kravt inn við støði í lønarseðlum hjá viðkomandi løntakara. Víst verður til viðmerkingarnar í kapittul *2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur* og til serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 8 í kapittul 3.1.

Feløgini í Samtak taka í høvuðsheitum undir við broytingunum, sum skotnar verða upp, við tí undantaki, at tey mæla til at hækka arbeiðsloysisstuðulin til í mesta lagi 20.000 kr. um mánaðin. Tey vísa á, at hetta er sama upphædd, sum stuðulin var undir koronaskipanini, og er eisini upphæddin, sum kundi fáast úr Arbeiðsloysisskipanini, áðrenn stuðulin varð lækkaður niður í 17.500 kr. í 2012. Feløgini vísa á, at lønirnar sambært sáttmálunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum liggja í millum 25.000 kr. og 35.000 kr. um mánaðin fyri flest allar lønarbólkar, tá ið løntakarin hevur arbeitt í nøkur ár. Tí er lønarmissurin hjá teimum flestu, ið gerast arbeiðsleys og fáa arbeiðsloysisstuðul, ógvuliga stórur. Feløgini halda, at Arbeiðsloysisskipanin er væl fyri, og heita tískil á landsstýrismannin og stýrið fyri ALS at taka hendan partin av stuðlinum upp til nýggja viðgerð.

Feløgini í Samtak siga, at tað er ein veruleiki, at nógv arbeiða niðursetta tíð, tí at til ber ikki at fáa fulltíðarstørv. Tí heita feløgini á landsstýrismannin og stýrið fyri ALS um at hyggja at hugtakinum "arbeiðsleys" og at víðka skrásetingarhugtakið í ALS høpi, soleiðis at parttíðararbeiðsloysi kann skrásetast og fáa heimild til útgjald. Mælt verður eisini til at hækka útgjaldið úr fiskavirkisskipanini til 40 tímar um vikuna í mun til 32 tímar um vikuna, og at dagføra skipanina fyri fiskimenn, hvørs skip verða løgd vegna umvælingar. Feløgini halda, at upphæddirnar í hesum skipanum eru alt ov lágar vegna órímiligar mótrokningarhættir.

Harafturat halda feløgini í Samtak, at av tí at tað er møguligt at útseta pensjónina, er eisini neyðugt at tryggja, at arbeiðsfólk og sjómenn yvir pensjónsaldur, sum hava útsett pensjónina, fáa heimild at fáa úr fiskavirkisskipanini og skipanini fyri fiskimenn, um tey annars lúka treytirnar. Víst verður til fylgiskjal 12.

Viðmerking frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum:
Stýrið fyri ALS hevur mælt landsstýrismanninum til at hækka mesta útgjaldið úr Arbeiðsloysisskipanini til 18.500 kr. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru umboðaðir í stýrinum

fyri ALS, og tí verður skotið upp at hækka mesta arbeiðsloysisstuðulin til 18.500 kr. og ikki 20.000 kr., sum Samtak mælir til. Umhvørvis- og vinnumálaráðið gevur hinum hugskotunum hjá Samtak til broytingar og endurskoðanir í ALS-lógini gætur, men tilmælini frá Samtak um at gera broytingar í øðrum viðurskiftum í ALS-lógini verða tó ikki tikin við í hetta lógaruppskotið.

Føroya Skipara- og navigatørfelag tekur sum útgangspunkt undir við at lækka ALS-gjaldið úr 1,25% til 1%, men mælir til at vísa varsemi, tí tíðirnar kunnu broytast til tað verra, og tá kann verða trupult at hækka inngjaldið aftur. Felagið tekur somuleiðis sum útgangspunkt undir við, at útgjaldsprosentið hækkar úr 75% upp í 80% av útrokningargrundarlagnum, men at nevndi prosentparturin skal roknast av aðrari upphædd fyri sjófólk enn fyri starvsfólk á landi. Tað kundi verið av eini minstuløn, sum í dag er 1.100 kr. pr. mynstraðan dag, faldað við tí starvi, viðkomandi persónur er mynstraður eftir. Tað sama ger seg galdandi fyri hækkingina av hámarksútgjaldinum úr 210.000 kr. árliga upp í 222.000 kr. árliga. Tikið verður undir við, at arbeiðsleys, sum fáa arbeiðsloysisstuðul, rinda eftirlønargjald sambært eftirlønarlógini. Mælt verður til, at § 20 a um arbeiðsloysisstuðul til fiskimenn, sum eru við fiskiskipum, sum verða løgd til umvælingar, verður endurskoðað. Hetta skal gerast við, at "karantenan" upp á 30 dagar verður strikað og við at strika § 20 a, stk. 1, 3. pkt. Víst verður til fylgiskjal 8.

Viðmerking frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum:
Tilmælini frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag um at gera broytingar í øðrum viðurskiftum í ALS-lógini verða tó ikki tikin við í hetta lógaruppskotið.

Heilsumálaráðið metti ikki, at lógaruppskotið hevði serligar avleiðingar fyri heilsuøkið og hevði ikki aðrar viðmerkingar. Víst verður til fylgiskjal 9.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið tekur samanumtikið undir við ætlaðu broytingunum, men ger vart við, at stutta hoyringarfreistin hevði við sær, at lógaruppskotið ikki hevur fingið eina nøktandi viðgerð í nevnd felagsins. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið heldur, at tíðin helst er komin til at endurskoða Arbeiðsloysisskipanina, tí felagið setur spurnartekin við, um skipanin fevnir nóg breitt í mun til ymisleikan á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum í dag. M.a. eigur at verða hugt eftir, um tíðin, ið arbeiðsleys kunnu fáa útgjald úr skipanini, kann styttast, meðan upphæddin møguliga kann verða sett hægri í eitt tíðarskeið, men verður lækkað, um arbeiðsleys verða í skipanini í eitt longri tíðarskeið. Víst verður til fylgiskjal 10.

Viðmerking frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum:
Umhvørvis- og vinnumálaráðið gevur hugskotunum hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum til endurskoðan av Arbeiðsloysisskipanini gætur, men tekur ikki hesi viðurskiftir upp í hesum lógaruppskotinum.

Fakfelagssamstarvið tekur undir við broytingunum í lógaruppskotinum. Hóast Fakfelags-samstarvið tekur undir við, at mánaðarligi arbeiðsloysisstuðulin verður hækkaður úr 17.500 kr. upp í 18.500 kr., so ynskir Fakfelagssamstarvið, at útgjaldið verður hækkað upp aftur í 20.000 kr., eins og tað var áðrenn árslok 2012. Orsøkin er, at kostnaðarstøðið í samfelagnum er hækkað munandi síðan 2012, og at haldførið í ALS-grunninum er so gott. Víst verður til fylgiskjal 14.

Viðmerkingar frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnuum
Stýrið fyri ALS hevur mælt landsstýrismanninum til at hækka mesta útgjaldið úr Arbeiðsloysisskipanini til 18.500 kr. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru umboðaðir í stýrinum

fyri ALS, og tí verður skotið upp at hækka mesta arbeiðsloysisstuðulin til 18.500 kr. og ikki 20.000 kr., sum Fakfelagssamstarvið ynskir.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Inntøkur og útreiðslur stovnsins verða ikki tiknar við á løgtingsfíggjarlógina, og tí hevur uppskotið sum útgangsstøði ikki ávirkan á landskassan, sí tó niðanfyri undir yvirskriftini *Hækka arbeiðsloysisstuðulin*.

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri ALS.

Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd
Uppskotið víðkar skaran av møguligum gjaldskyldugum persónum til ALS, tí at ALS-gjald skal rindast av øðrum inntøkum enn bara a-inntøkum. Harvið er sannlíkt, at samlaðu inngjøldini – alt annað óbroytt – fara at verða nakað hægri, samanborið við tað, tey høvdu verið, hevði lógin ikki verið broytt.

Hækka arbeiðsloysisstuðulin
Hóast uppskotið sum útgangsstøði ikki hevur ávirkan á landskassan, verður mett, at nakrar fleiri skattakrónur koma í lands- og kommunukassarnar orsakað av, at arbeiðsloysisstuðulin hækkar úr 75% upp í 80% av inntøkuni seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn arbeiðsloysið er staðfest, og at loftið fyri mánaðarliga arbeiðsloysisstuðulin hækkar úr 17.500 kr. upp í 18.500 kr.

Hjá Arbeiðsloysisskipanini verður talan um øktar útreiðslur. Hvussu nógv, útreiðslurnar fara at økjast, er ilt at siga neyvt, av tí at hetta í stóran mun er ávirkað av, hvussu stórt arbeiðsloysið er, og harvið hvussu stórt samlaða útgjaldið úr skipanini er. At útgjaldið verður hækkað, fer sjálvandi at økja um útreiðslurnar hjá Arbeiðsloysisskipanini, hóast arbeiðsloysið ikki broytist.

Mett verður, at miðalútgjøldini hækka við stívliga 6% orsakað av hesum broytingunum í útgjøldunum. Verður lógarbroytingin saman við kunngerðarbroytingini framd, fara útgjøldini at hækka, meðan samlaðu inngjøldini væntast at lækka við umleið 50 mió. krónum, og tað verður mett, at skipanin aftan á broytingarnar megnar 4 ár við einum arbeiðsloysi upp á 10% og 6-7 ár við einum arbeiðsloysi upp á 8%. Hetta skal tó takast við fyrivarni, tí nógvir faktorar kunnu ávirka inn- og útgjøldini í skipanini.

Arbeiðsloysi	**8%**	**10%**
Tal av fólkum, sum fáa útgjald úr ALS	1.900	2.500
Miðalútgjald pr. skeið	5.900 kr./skeið	
Inngjøld	200,0 mkr.	200,0 mkr.
Útgjøld í alt	337,2 mkr.	437,6 mkr.
Tekniskt úrslit	**- 137,2 mkr.**	**- 237,6 mkr.**
Rakstrarkostnaðir og avskr.	19,6 mkr.	19,6 mkr.
Avskrivingar	0,3 mkr.	0,3 mkr.
Fíggjarinntøkur	9,0 mkr.	9,0 mkr.
Meirvirðisgjald	0,9 mkr.	0,9 mkr.

Ársúrslit	**- 149,1 mkr.**	**-249,4 mkr.**
Eginogn, ult. 2019	910,0 mkr.	910,0 mkr.
Væntað eginogn, ult. 2020	941,0 mkr.	941,0 mkr.
Haldføri til insolvens (eginogn ult. 2020)	6 – 7 ár	4 ár

Lækka ALS-gjaldið
Samstundis sum hetta lógaruppskotið kemur í gildi, verður kunngerð nr. 136 frá 3. november 2009 um ALS-gjald broytt, soleiðis at ALS-gjaldið lækkar við 0,25% stigum; úr 1,25% niður í 1%. Mett verður, at hesar broytingar fara at hava við sær, at inngjøldini væntandi minka úr 255 mió. kr. í 2020 niður í umleið 200 mió. kr. í 2021.

Eftirløn av arbeiðsloysisstuðli
Tvungið eftirlønargjald verður lagt afturat arbeiðsloysisstuðlinum. Broytingin viðvíkjandi eftirlønini kom í roynd og veru í gildi 1. januar 2019, tá ið pensjónsnýskipanin kom í gildi. Tí er tað ikki hetta lógaruppskotið, sum elvir til øktar útreiðslur fyri ALS til eftirlønargjald, men fyri at fáa samsvar í millum eftirlønarlógina og ALS-lógina, er neyðugt at áseta í ALS-lógina, at tvungið eftirlønargjald verður lagt afturat arbeiðsloysisstuðlinum.

Meirútreiðslurnar vegna eftirlønargjaldið verða á leið 12 mió. kr. í 2020 – tá eru eftirlønir av útgjøldunum til serligu koronaskipanina tiknar við. Hvørjar meirútreiðslurnar verða í 2026, tá eftirlønargjaldið er komið upp á 12%, er eyðsæð óvist, tí tað veldst um, hvussu stórt arbeiðsloysið verður tá. Verður arbeiðsloysið í 2026 á leið 4%, verða rindaðar samanlagt 19 mió. krónur til 20 mió. krónur í eftirlønum av arbeiðsloysisstuðlinum. Roknað verður við, at tá arbeiðsloysið er 4%, eru tað sløk 1.000 fólk, sum fáa útgoldið arbeiðsloysisstuðul frá ALS. Arbeiðsloysið seinastu 23 árini hevur í miðal verið 3,7% ella har á leið; so tá arbeiðsloysið sum í døminum omanfyri er 4%, er tað oman fyri tað, sum tað í miðal hevur verið seinastu nógvu árini.

Víst verður eisini til hoyringarsvarið frá ALS til løgtingsmál nr. 69/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin) (Pensjónsnýskipan), har ALS hevur eina meting av eyka kostnaðinum fyri ALS-skipanina. ALS vísir á, at í miðal kann roknast við 19 mió. kr. árliga, tá ið gjaldið er komið upp á 12%. Men at kostnaðurin annars kann sveiggja millum 5 og 35 mió. kr. árliga, alt eftir arbeiðsloysinum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri ALS.

Skarin av gjaldskyldugum til Arbeiðsloysisskipanina verður víðkaður til eisini at fevna um løntakarar og arbeiðsgevarar, sum ikki eru í føroyskum skipanum frammanundan. Her verður sostatt neyðugt við upplýsing um møguleikar og skyldur, soleiðis at hesi verða kunnug við síni rættindi og sínar skyldur.

ALS hevur langa siðvenju við at krevja bæði løntakarar og arbeiðsgevarar eftir gjøldum, sum ikki verða drigin sjálvvirkandi um afturhaldsskipanina hjá TAKS. Hetta verður gjørt soleiðis, at ALS sendir rokningar sambært uppgerðum, sum verða gjørdar við støði í teimum lønarseðlum, sum løntakarin letur ALS. Summi av hesum gjøldum skulu krevjast úr útlondum. Í

teimum førum, er tað neyðugt at meta um hvørt einstakt mál, hvørt tað loysir seg at krevja ágóða inn frá fólki, sum býr í øðrum londum. Tað ber eisini til at samstarva og samskifta við myndugleikar í øðrum londum um at tryggja, at løntakarar og arbeiðsgevarar rinda tey almannagjøldini, tey eiga at rinda – í landinum, har tey skulu rindast.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Høvuðsreglan er, at arbeiðstakarar skulu rinda sosial gjøld í landinum, har teir arbeiða, og á tann hátt verða sosialt tryggjaðir í landinum, har arbeiðið verður útint. Grundað á tvílandaavtalu við Norra sambært norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd ber til hjá ávísum føroyingum, sum arbeiða í Norra, at søkja um undantøku frá at vera almannatryggjaðir í Norra við teirri fyritreyt, at teir rinda øll sosial gjøld í Føroyum. Skyldan at rinda sosialu gjøldini áliggur bæði persóninum sjálvum og arbeiðsgevara hansara, eisini tá ið tað snýr seg um útlendskan arbeiðsgevara.

Sum staðfest í dómi frá Føroya Rætti, er neyðug heimild ikki í ALS-lógini at áleggja arbeiðstakarum og arbeiðsgevarum at rinda ALS-gjald av slíkum inntøkum, sum ikki eru A-inntøkur. Tað hevur havt við sær óvissu fyri arbeiðstakarar, sum verða leigaðir út av føroyskum fyritøkum at arbeiða í Norra.

Við hesum uppskotinum verður neyðuga heimildin fingin til vega, soleiðis at arbeiðstakarar, búsitandi í Føroyum og arbeiðandi í øðrum Norðurlondum, kunnu verða arbeiðsloysis-tryggjaðir í Føroyum, treytað av, at nærri treytir eru loknar sambært norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd.

Harafturat fáa øll, ið arbeiða í Føroyum, og arbeiðsgevarar teirra, skyldu at rinda til Arbeiðsloysisskipanina, sum eisini er í samsvari við meginregluna í norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd. Tað verður ikki longur ein treyt, at talan er um A-inntøku.

Fjórða hvørt ár verða arbeiðsgevarafeløgini og fakfeløgini biðin um at koma við tilmæli til limir til bæði kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini og kærunevndina hjá Barsilsskipanini. Við lógaruppskotinum verður einans neyðugt at tilmæla limir til eina og somu kærunevnd.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið tryggjar ferðandi arbeiðstakarum tey rættindi og skyldur innan arbeiðsloysis-trygging, sum reglurnar í norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd áseta. Talan er um rættindini og skyldurnar hjá bæði føroyingum, ið arbeiða í øðrum Norðurlandi, og norðurlendingum, ið arbeiða í Føroyum. Neyðugu heimildirnar verða nú fingnar til vega, soleiðis at bæði høvuðsregla og undantak í norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd kunnu brúkast.

Uppskotið hevur við sær, at arbeiðsleysir løntakarar fáa størri arbeiðsloysisstuðul enn nú. Hægsti mánaðarligi arbeiðsloysisstuðulin hækkar úr 17.500 kr. upp í 18.500 kr.

Uppskotið ger, at arbeiðsloysisstuðul verður eftirlønargevandi. Tað ger, at arbeiðstakarar áhaldandi kunnu spara upp til eftirløn, eisini tá ið tey eru arbeiðsleys og fáa arbeiðsloysisstuðul í eitt ella fleiri tíðarskeið. Eftirlønargjaldið verður lagt oman á arbeiðsloysisstuðulin og verður rindað av ALS á eftirlønarkontu hjá tí arbeiðsloysistryggjaða. Í veruleikanum hevur arbeiðsloysisstuðul verið eftirlønargevandi síðan 1. januar 2019.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd er ein av høvuðsorsøkunum til hetta lógaruppskotið. Tað er staðfest í dómi frá Føroya Rætti, at ALS ikki hevur heimild at krevja ALS-gjald frá løntakarum, sum ikki hava A-inntøku. Meginreglan í norðurlendska sáttmálanum er, at sosial gjøld skulu rindast í landinum, har arbeiðið verður útint. Undantøk kunnu avtalast millum viðkomandi málføru (kompetentu) myndugleikar, soleiðis at sosialu gjøldini kunnu rindast í landinum, har løntakarin hevur bústað. Tvílandaavtalur eru gjørdar sambært norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd millum Norra og Føroyar um, at tríggir yrkisbólkar kunnu sleppa undan gjaldskylduni í Norra, um øll sosial gjøld í staðin verða rindað í Føroyum. Sáttmálalimalondini hava eisini møguleika at avtala undantøk fyri einstakar persónar. Við hesum uppskoti verður heimild sett í ALS-lógina, soleiðis at rættindini og skyldurnar í millumlandaavtalunum lógliga kunnu fremjast í verki.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Mett verður ikki, at evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS, er viðkomandi fyri uppskotið.

Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, er heldur ikki viðkomandi fyri uppskotið.

Hoyvíkssáttmálin er heldur ikki viðkomandi fyri uppskotið.

2.9. Markaforðingar

Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd ásetur reglur, sum fyribyrgja markaforðingum millum Norðurlond, og við broytingini verður ALS-lógin í samsvari við sáttmálareglurnar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting ella sektir, og tað ger ikki størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld

Heimildargrundarlagið fyri ALS-gjaldinum er, at talan er um A-inntøku og fulla skattskyldu til Føroyar. Men við hesum lógaruppskotinum verður skarin av gjaldskyldugum víðkaður til eisini at fevna um tey, ið móttaka lønarinntøku fyri arbeiði, útint í Føroyum, sum ikki er A-inntøka, og til persónar, búsitandi í Føroyum, sum fáa lønarinntøku úr øðrum Norðurlandi, í tann mun norðurlendski sáttmálin um almannatrygd loyvir hesum. Her verður ikki krav um A-inntøku ella fulla skattskyldu til Føroyar.

2.12. Gjøld

Uppskotið hevur við sær, at tey, sum sambært norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd eiga at vera almannatryggjað í Føroyum, ella sum sambært undantakinum í sáttmálanum eru almannatryggjað í Føroyum, og arbeiðsgevarar teirra skulu rinda ALS-gjald til ALS. Harumframt hevur uppskotið við sær, at tey, ið móttaka lønarinntøku úr Føroyum, sum ikki er A-inntøka, og arbeiðsgevarar teirra eisini gerast gjaldskyldug til ALS.

Uppskotið hevur eisini við sær, at arbeiðsleys, ið móttaka arbeiðsloysisstuðul, skulu rinda eftirlønargjald av arbeiðsloysisstuðlinum. Eftirlønargjaldið skal rindast sambært eftirlønarlógini og hækkar tískil stigvíst frá 5% 1. januar 2019 til 12% 1. januar 2026. Fyri at arbeiðsleys ikki skulu fáa minni útgoldið í arbeiðsloysisstuðli, veksur arbeiðsloysisstuðulin stigvíst við somu upphædd, sum skal rindast til eftirløn. Tann arbeiðsleysi fær somu upphædd útgoldna sum nú, meðan eftirlønargjaldið verður rindað á eftirlønarkontu.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?

Uppskotið áleggur ikki fólki skyldur so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella krøv um loyvi.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Lógaruppskotið gevur landsstýrismanninum heimild til at góðkenna samsýningina til stýrislimirnar í stýrinum fyri ALS.

Lógaruppskotið leggur eisini heimild til landsstýrismannin at áseta reglur í kunngerð um talgilt samskifti. Vanligt er, at stýrið fyri ALS heitir á landsstýrismannin um at seta í gildi tær reglur, sum tørvur er á, og sum lógarheimild er til.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar, enn omanfyri tilskilað.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndugleikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Ja	Ja

Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Ja	Ja
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

§ 1, nr. 1
Her verður ásett, hvørjar inntøkurnar hjá ALS eru. Inntøkurnar verða útvegaðar við gjøldum frá teimum, sum taka ímóti, og sum rinda tær í nr. 1 nevndu inntøkur, umframt gjøldum frá sjálvstøðugum vinnurekandi, sum hava teknað arbeiðsloysistrygging, og persónum, sum hava teknað sjálvbodnar skipanir.

Grundarlagið fyri gjaldi til ALS-grunnin verður víðkað til eisini at umfata lønarinntøkur, sum ikki eru A-inntøkur. Eftir galdandi reglum, skulu tey, sum móttaka, og tey, sum rinda A-inntøku, rinda gjøld til Arbeiðsloysisskipanina. A-inntøkur eru allýstar í § 57 og § 60 í skattalógini.

§ 2, nr. 1, litra a
Útgangsstøðið er, at allar lønarinntøkur, sum verða goldnar av arbeiðsgevara við heimatingi ella føstum rakstrarstaði í Føroyum, verða roknaðar sum A-inntøkur. Harumframt verða aðrar inntøkur frá føroyskum keldum, so sum nevndarsamsýningar, pensjónir og stuðul av ymsum slagi, eisini roknaðar sum A-inntøkur. Hóast A-inntøkuhugtakið sostatt fevnir um aðrar inntøkur enn lønarinntøkur, verður mett, at gjald til Arbeiðsloysisskipanina framvegis sum útgangsstøði skal verða goldið av øllum A-inntøkum. Undantøk eru tó, og tey standa í § 8, stk. 1 í lógini; sí serligu viðmerkingarnar niðanfyri til § 1, nr. 5.

§ 2, nr. 1, litra b
Sum nýtt í litra b) verður ásett, at gjøld til Arbeiðsloysisskipanina eisini skulu rindast av lønarinntøkum fyri arbeiði, útint í Føroyum, sum ikki eru A-inntøkur. Lønarinntøka er alt tað, sum er lagt inn í peningi ella peningsvirði í tænastu fyri arbeiðsgevarar. Tað er meginreglan í norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd, at gjøld til almannatrygd verða rindað í tí landi, har arbeiðið er útint. Við núverandi áseting skal ALS-gjald einans rindast av A-inntøkum. Tað kann tó koma fyri, at persónar forvinna lønarinntøku fyri útint arbeiði í Føroyum, uttan at arbeiðsgevarin hevur skyldu at rinda inntøkuna sum A-inntøku, av tí at arbeiðsgevarin hvørki hevur heimating ella fastan rakstrarstað í Føroyum. Við nýggju ásetingini verður tryggjað, at gjøld til Arbeiðsloysisskipanina verða rindað av øllum lønarinntøkum fyri arbeiði útint í Føroyum. Hetta er galdandi óansæð, um løntakarin er búsitandi í Føroyum ella aðrastaðni.

Við arbeiði í Føroyum meinast við arbeiði á landi í Føroyum, arbeiði umborð á føroyskum skipum og arbeiði umborð á flogførum, ið verða rikin av føroyskum felagi.

Um so er, at persónar, sum arbeiða í Føroyum, sambært millumtjóðasáttmála eru sosialt tryggjaðir í øðrum landi, hava teir ikki skyldu at rinda inn til Arbeiðsloysisskipanina. Sí serligu viðmerkingarnar niðanfyri til § 1, nr. 4.

§ 2, nr. 1, litra c
Sum nýtt í litra c) verður ásett, at gjald skal rindast til Arbeiðsloysisskipanina av lønarinntøkum fyri arbeiði, útint í øðrum Norðurlandi, tá ið viðkomandi persónur samsvarandi reglunum í norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd er sosialt tryggjaður í Føroyum. Hetta er í samsvari við norðurlendska sáttmálan um almannatrygd; tó hevur heimild sum oftast ikki verið

í ALS-lógini til at nýta henda møguleika, av tí at gjaldsgrundarlagið hevur verið avmarkað til A-inntøkur.

Sum støðan er nú, hevur Almannaverkið, sum er føroyski málføri myndugleikin, gjørt avtalu við NAV í Norra um undantak frá meginregluni um at rinda sosial gjøld í arbeiðslandinum fyri tríggjar bólkar av løntakarum. Hesir bólkar eru føroyskir fiskimenn á norskum fiskiskipum, føroysk sjófólk á norskum seismikk- og supplyskipum og føroyskir handverkarar, sum arbeiða í Norra. Verða nýggjar avtalur gjørdar, sum undantaka ávísan persón ella yrkisbólk frá meginregluni í sáttmálanum, verður ALS-gjald eisini kravt av viðkomandi lønarinntøkum.

Við arbeiði í øðrum Norðurlandi meinast við arbeiði á landi í øðrum Norðurlandi, arbeiði umborð á skipi, heimahoyrandi í øðrum Norðurlandi, og arbeiði umborð á flogførum, ið verða rikin av felagi í øðrum Norðurlandi. Og við lønarinntøku meinast alt tað, sum er lagt inn í peningi ella peningsvirði í tænastu fyri arbeiðsgevarar.

Higartil hevur verið ásett í ALS-lógini, at tey, ið rinda A-inntøkur, hava skyldu at rinda til Arbeiðsloysisskipanina. Útlendskir arbeiðsgevarar, sum ikki hava heimating ella fastan rakstrarstað í Føroyum, eru sostatt undantiknir frá at rinda til Arbeiðsloysisskipanina, hóast teir hava løntakarar í starvi, sum útinna arbeiði í Føroyum.

Broytingin hevur við sær, at øll, sum rinda inntøkur, fevndar av nr. 1, eisini fáa skyldu at rinda til Arbeiðsloysisskipanina. Hetta er í samsvari við norðurlendska sáttmálan um almannatrygd, ið ásetir, at gjaldskylda hjá arbeiðsgevara fylgir við gjaldskyldu hjá løntakara. Er løntakarin undantikin gjaldskyldu til ALS, tí hann er fevndur av sosialu lóggávuni í einum øðrum landi sambært nýggju ásetingini í § 7, stk. 2, er arbeiðsgevari hansara somuleiðis undantikin gjaldskyldu. Víst verður til serligu viðmerkingarnar niðanfyri til § 1, nr. 4.

§ 2, nr. 2
Ásetingin fevnir um sjálvstøðug vinnurekandi og inniheldur onga broyting í mun til galdandi reglur.

§ 2, nr. 3
§ 2, nr. 3 sipar til teir persónar, sum ikki hava møguleika at vera arbeiðsloysistryggjaðir í Føroyum ella uttanlands. Heimildin til at tekna sjálvbodna trygging varð sett í ALS-lógina í 1994. Heimildin varð givin, soleiðis at persónar, sum arbeiða uttanlands ella umborð á altjóða skrásettum skipi, og sum annars ikki hava møguleika at vera arbeiðsloysistryggjaðir í Føroyum ella uttanlands, eftir egnum ynski kundu tekna arbeiðsloysistrygging í ALS. Í lógarviðmerkingunum var nágreinað, at "*[t]reytin er, at hesir persónar ikki hava møguleika at verða tryggjaðir í Føroyum ella uttanlands. Henda serskipan er sjálvboðin, og skal tryggingartakarin sjálvur gjalda eina upphædd (...)*". Ásetingin er førd víðari í § 13 í núverandi ALS-lóg, sum er frá 1997; lógarviðmerkingarnar eru tó ikki endurtiknar í lógaruppskotinum.

Ásetingar um hesi viðurskifti eru í norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd. Meginreglan er, at ein skal vera arbeiðsloysistryggjaður í landinum, har arbeiðið er útint, ella fyri sjófarandi, í flagglandinum. Einans í teim førum, har hesin møguleiki ikki er til staðar, t.e. uttan fyri økið, har sáttmálin er galdandi, ber til at tekna sjálvbodna trygging í ALS.

§ 1, nr. 2
Lýsingin av Arbeiðsloysisskipanini verður broytt frá at vera ein stovnur til at vera ein grunnur. Spurnartekin hevur ofta verið sett við, um ALS er ein stovnur, tí at eitt stýri er í millum

fyrisitingina og landsstýrismannin. Bygnaðurin er tí ikki tann sami sum í vanligum almennum stovnum undir landsstýrinum. Í vanligari talu verður heitið ALS-grunnurin ofta nýtt. Av tí at peningur verður kravdur inn til Arbeiðsloysisskipanina, sum síðan verður rindaður út sum arbeiðsloysisstuðul, verður mett, at orðið grunnur hóskar betur enn stovnur.

§ 1, nr. 3
Sum nú er, er tað stýrið fyri ALS, sum ásetur samsýningina til stýrislimirnar. Hetta verður gjørt í starvsskipanini sambært § 4, stk. 5 í lógini. Við hesum verður ásett í lógina, at landsstýrismaðurin skal góðkenna samsýningina til stýrislimirnar.

§ 1, nr. 4
§ 7, stk. 1, nr. 1
Higartil hava einans persónar, sum hava fulla skattskyldu til Føroyar, havt skyldu at rinda til Arbeiðsloysisskipanina. Fulla skattskyldu til Føroyar hava persónar, sum eru fevndir av § 1 í skattalógini. Talan er um persónar, sum hava bústað í Føroyum, ella persónar, sum uttan at hava bústað í Føroyum, uppihalda sær í Føroyum í minst 180 dagar innan fyri eitt 12 mánaða tíðarskeið. Føroysk lesandi uttanlands kunnu eisini eftir umsókn varðveita fulla skattskyldu til Føroyar.

Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd ásetur, at sosial gjøld skulu rindast í landinum, har persónurin arbeiðir. Tí verður ikki mett, at tað er rætt at undantaka persónar, sum arbeiða í Føroyum, heruppií umborð á føroyskum skipum ella flogførum, sum verða rikin av føroyskum felagi, frá at rinda til Arbeiðsloysisskipanina. Nógvir persónar arbeiða í Føroyum uttan at hava fulla skattskyldu í Føroyum, av tí at teir hvørki búgva ella eru nóg leingi í Føroyum. Tað kann snúgva seg um persónar, sum arbeiða fyri føroyskan ella útlendskan arbeiðsgevara.

Við nýggju ásetingini gerast allir persónar, sum hava fylt 16 ár, men ikki hava nátt fólkapensjónsaldur, sum hann er ásettur í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., og sum móttaka inntøkur, sum nevndar í § 2 í lógini, gjaldskyldugir til Arbeiðsloysisskipanina. Tað er tó møguligt at gera avtalur sambært norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd, sum loyva persónum frá Norðurlondum at vera sosialt tryggjaðir í teirra heimlandi og harvið ikki vera gjaldskyldugir til ALS. Tað er framvegis ein møguleiki hjá persónum, ið hava tíðaravmarkað uppihalds- og arbeiðsloyvi at søkja um undantak frá gjaldskylduni fyri upp til eitt ár í senn sambært § 8, stk. 3.

§ 7, stk. 1, nr. 2
Fyri at tryggja, at gjaldskyldan hjá arbeiðsgevara fylgir gjaldskylduni hjá løntakara, verður ásett, at øll, sum rinda inntøku, sum nevnd í § 2, nr. 1 í lógini, verða gjaldskyldug til Arbeiðsloysisskipanina. Hetta er ein víðkan av verandi reglum, ið áseta, at bert tey, ið gjalda A-inntøkur, hava skyldu at rinda til Arbeiðsloysisskipanina.

Hetta er eisini galdandi fyri arbeiðsgevarar hjá føroyingum, sum arbeiða í øðrum Norðurlondum, og sum sambært ásetingum í norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd, eru almannatryggjaðir í Føroyum. Hetta er í samsvari við artikul 21 í ES-fyriskipan nr. 987/2009, (sum er ein av ES-fyriskipanunum, sum norðurlendski sáttmálin um almannatrygd byggir á).

§ 7, stk. 2
Sambært § 7, stk. 2 í lógini eru persónar, sum eftir løgtingslóg um almannapensjónir fáa hægstu fyritíðarpensjón, undantiknir gjaldskyldu til ALS, um teir søkja um frítøku. Av tí, at allar

fyritíðarpensjónir eru undantiknar gjaldskyldu sambært § 8, stk. 1, nr. 1, verður ásetingin um hægstu fyritíðarpensjón tikin úr ALS-lógini.

Skotið verður upp, at § 7, stk. 2 í staðin skal snúgva seg um, at persónar, sum sambært ásetingum í millumtjóðasáttmála eru sosialt tryggjaðir í øðrum landi, eru undantiknir gjaldskyldu til ALS. Hendan ásetingin er í samsvari við norðurlendska sáttmálan um almannatrygd. Høvuðsreglan sambært sáttmálanum er, at norðurlendingar skulu vera sosialt tryggjaðir í landinum, har arbeitt verður. Men møguleiki er hjá sáttmálalimalondunum ella teirra málføru myndugleikum at avtala undantøk til fyrimuns fyri ávísar persónar ella yrkisbólkar sambært artikul 16 í ES-fyriskipan nr. 883/2004. Kemur t.d. ein svii til Føroya at arbeiða, fær viðkomandi skyldu at rinda til ALS. Men velur sviin sambært avtalu við støði í norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd at vera sosialt tryggjaður í Svøríki, verður hann undantikin gjaldskyldu til ALS.

§ 1, nr. 5
§ 8, stk. 1 verður broytt soleiðis, at ásetingin verður í samsvari við broytingina av § 2. Ásetingin nágreinar, hvørjum inntøkum ALS-gjaldið verður roknað av, og hvørji undantøk eru. Viðvíkjandi inntøkunum, sum ALS-gjald skal rindast av, verður víst til serligu viðmerkingarnar til nýggju § 2, nr. 1 omanfyri undir serligu viðmerkingunum til § 1, nr. 1 í lógaruppskotinum.

Sum útgangsstøði eru skattskyldugar almannaveitingar undantiknar gjaldskyldu. Tó eru endurgjald fyri inntøkumiss sambært § 17, stk. 3 í lovbekendtgørelse nr. 100 af 2. marts 1988 om offentlig forsorg (Forsorgarlógin), ansingarsamsýning fyri at ansa gomlum og óhjálpnum sambært § 12 í løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og sjúkradagpengar sambært løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m. fevndar av gjaldskylduni.

Ásetingin um, at endurgjald fyri inntøkumiss sambært § 17, stk. 3 í forsorgarlógini er gjaldskyldug inntøka, er óbroytt.

Ásetingarnar um, at ansingarsamsýning fyri at ansa gomlum og óhjálpnum sambært § 12 í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og sjúkradagpengar sambært løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. eru gjaldskyldugar inntøkur, eru nýggjar. Endamálið við hesum báðum nýggju undantøkunum til undantakið er, at hesar inntøkurnar verða tryggjaðar og verða partur av útrokningargrundarlagnum, um persónur, sum móttekur slíka inntøku, verður arbeiðsleysur. Talan er tó ikki um eina nýskipan, men at gera heimild í lógina til ta siðvenju, sum ALS hevur útint í langa tíð.

Ein nýskipan við broytingini av § 8, stk. 1 er, at A-inntøka til avmarkaða skattskyldu undir FAS-skipanini og undir FAS-líknandi skipan, sum gevur rætt til afturbering av skatti til reiðaran, bert er undantikin gjaldskyldu, um so er, at viðkomandi løntakari ikki hevur fastan bústað í Føroyum ella í einum av hinum Norðurlondunum. Hetta samsvarar við norðurlendska sáttmálan um almannatrygd, har høvuðsreglan er, at norðurlendingar rinda sosial gjøld í landinum, har arbeitt verður.

Einasta broytingin í § 8, stk. 1, nr. 4 um tænastumannapensjónir o.a. er, at ávísingin til § 8 a verður strikað. Hetta hevur við sær, at tað ikki longur er neyðugt at søkja um undantak, um ynskt verður at sleppa undan at rinda ALS-gjald av tænastumannapensjónum o.ø. Víst verður til serligu viðmerkingarnar niðanfyri til § 1, nr. 6.

§ 1, nr. 6
§ 8 a snýr seg um, at undantøka frá gjaldskyldu til ALS av hægstu fyritíðarpensjón, tænastumannapensjónum og øðrum líknandi eftirlønum verður veitt eftir umsókn. Støðan er tó tann, at persónar, ið móttaka hesar inntøkur, ikki noyðast at senda inn umsókn fyri at fáa undantøku. Orsøkin er, at Gjaldstovan og Almannaverkið stýra hesum útgjøldunum við serligum V-tølum, ið verða nýtt til útgjøld av ikki gjaldskyldugum veitingum. Umsóknir verða sostatt ikki nýttar til at fáa frítøku frá at rinda ALS-gjald av hægstu fyritíðarpensjón, tænastumannapensjónum og øðrum líknandi eftirlønum, herundir uppihaldspeningur sambært hjúnabandslógini og barnapeningur sambært lov om børns retsstilling. Fyri at fáa samsvar millum lóg og praksis verður § 8 a strikað.

§ 1, nr. 7
§ 9, stk. 2, 1. pkt. verður broytt fyri at fáa samsvar við broytingina av § 2.

§ 9, stk. 2, 2. pkt. verður broytt fyri í kunngerð at kunna seta aðra gjaldfreist fyri tey, ið ikki áður hava verið gjaldskyldug til Arbeiðsloysisskipina. Tað eru tey, ið taka í móti lønarinntøku fyri arbeiði útint í Føroyum, sum ikki er A-inntøka, og tey, sum taka í móti lønarinntøku, sum ikki er A-inntøka, fyri arbeiði útint í Norðurlandi, og sum sambært ásetingum í millumtjóðasáttmála skulu rinda sosial gjøld í Føroyum. Hendan broyting verður gjørd, fyri at ALS kann gera gjaldsavtalu við tey, ið ikki fáa gjaldskyldugu inntøkuna rindaða umvegis skipan, sum eftirheldur A-skatt.

§ 1, nr. 8
Broytingin snýr seg um at broyta aldursmarkið í ALS-lógini frá 67 árum til at fylgja fólkapensjónsaldrinum, sum hann er ásettur í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. Hetta verður gjørt, fyri at rættindir og skyldur, ið fylgja av ALS-lógini, halda uppat, tá ið persónar fáa rætt til pensjón sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

§ 1, nr. 9
§ 15, stk. 1 ásetur, hvat útrokningargrundarlagið fyri útgjaldi úr Arbeiðsloysisskipanini er. Hendan áseting verður broytt fyri at fáa samsvar við broytingina av § 2 og § 8, stk. 1. Sí serligu viðmerkingarnar til broyting nr. 1 og nr. 5 omanfyri. Endamálið er, at rætturin til at taka í móti arbeiðsloysisstuðli fylgir skylduni at rinda ALS-gjald av inntøku.

§ 1, nr. 10
Eftir galdandi lóg er arbeiðsloysisstuðul pr. dag 75% av útrokningargrundarlagnum (móttikna A-inntøkan seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn arbeiðsloysið er staðfest), býtt við 253. Broytingin hevur við sær, at arbeiðsloysisstuðul pr. dag verður 80% av útrokningargrundarlagnum, býtt við 253.

Dømi: Ein persónur hevur havt eina A-inntøku á 20.000 kr. í miðal um mánaðin seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn arbeiðsloysið er staðfest. Arbeiðsloysisstuðulin er (20.000*0,75) 15.000 kr. Við hækkingini av arbeiðsloysisstuðlinum til 80% av útrokningargrundarlagnum, fær sami persónur (20.000*0,80) 16.000 kr. í arbeiðsloysisstuðli um mánaðin.

Broytingin hevur ikki ávirkan á arbeiðsloysisstuðulin hjá persónum, ið hava havt eina miðal lønarinntøku, sum er oman fyri 23.125 kr. um mánaðin. Hetta kemst av, at arbeiðsloysisstuðulin í mesta lagi er 222.000 kr. um árið, sum svarar til 18.500 kr. um mánaðin (sí serligu viðmerkingarnar til broyting nr. 11 niðanfyri). Er útrokningargrundarlagið hægri enn

23.125 kr. um mánaðin, verður farið upp um hámarkið, sum við hesum lógaruppskotinum verður hækkað úr17.500 kr. um mánaðin upp í 18.500 kr. um mánaðin.

§ 1, nr. 11
Sum er, kann árligi arbeiðsloysisstuðulin í mesta lagi vera 210.000 kr., sum svarar til 17.500 kr. um mánaðin. Broytingin hevur við sær, at árligi arbeiðsloysisstuðulin í mesta lagi kann vera 222.000 kr., umframt eftirlønargjaldið. Hetta svarar til, at arbeiðsloysisstuðulin í mesta lagi kann vera 18.500 kr. um mánaðin, umframt eftirlønargjaldið.

Í § 16, stk. 2, 1. pkt. verður tað gjørt greitt, at eftirlønargjald skal leggjast afturat arbeiðsloysisstuðlinum. Gjørt er á sama hátt í barsilslógini § 13, stk. 1. Í viðmerkingunum til løgtingslóg nr. 69 frá 30. apríl 2018 um broyting í eftirlønarlógini stendur: "*Umframt at rindast skal av almannaveitingum, hevur uppskotið eisini við sær, at rindast skal til pensjón av arbeiðsloysisstuðli og av minstuløn til fiskimenn. Um ikki veitingarnar skulu lækka, verður neyðugt við broyting í ALS-lógini og í kunngerð um inntøkutrygd soleiðis, at inngjøld til pensjón ikki verða tikin av núverandi veiting, men løgd afturat.*"

§ 1, nr. 12
Í § 17 verður ásett, at arbeiðsleys, sum fáa arbeiðsloysisstuðul, rinda eftirlønargjald sambært eftirlønarlógini. Gjørt er á sama hátt í barsilslógini § 14 b, stk. 1.

Upprunaliga varð eftirløn ikki rindað av arbeiðsloysisstuðli. Hetta stóð í § 3, nr. 1 í løgtingslóg nr. 49 frá 14. mai 2013 um eftirløn (Eftirlønarlógin). 1. januar 2019 varð § 3, nr. 1 strikað úr eftirlønarlógini; sí løgtingslóg nr. 69 frá 30. apríl 2018 um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin). Hetta hevði við sær, at eftirlønargjald er rindað av arbeiðsloysisstuðli síðan 1. januar 2019. Fyri at fáa samsvar millum ALS-lógina og broytingarnar í eftirlønarlógini verður ásett í § 16, stk. 2 í ALS-lógini, at arbeiðsloysisstuðulin er í mesta lagi kr. 220.000 umframt eftirlønargjaldið sambært § 17. Sí eisini serligu viðmerking til § 1, nr. 11 omanfyri. Hetta hevur við sær, at arbeiðsloysisstuðulin ikki minkar við tí upphæddini, sum verður rindað til eftirløn.

Broytingarnar viðvíkjandi eftirløn eru tekniskar broytingar, sum skulu fáa ALS-lógina í samsvar við umrøddu broyting í eftirlønarlógini. Arbeiðsloysisstuðul hevur í roynd og veru verið eftirlønargevandi síðan 1. januar 2019.

§ 1, nr. 13
Tá ið ALS-lógin varð broytt við løgtingslóg. nr. 71 frá 22. mai 2015, varð ásetingin í § 21 flutt til § 25 a. Tilvísingin til § 21 í § 24, stk. 1, 2. pkt. varð ikki broytt tilsvarandi. Hetta verður nú rættað.

§ 1, nr. 14
Avgerðir, sum Arbeiðsloysisskipanin hevur tikið viðvíkjandi arbeiðsloysi, kunnu kærast til kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Avgerðir hjá kærunevndini eru endaligar innan fyrisitingina, men kunnu skjótast inn fyri Føroya Rætt. Kærunevndin hevur tríggjar limir, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi arbeiðsgevarar og ein formann, ið skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir fyri 4 ár í senn, tó so at nevndarlimur verður sitandi til nýggjur er valdur. Samstundis verða vald varafólk, sum taka sæti í nevndini, tá limi berst frá.

Kærunevndin hjá Barsilsskipanini hevur somu treytir, sum eru nevndar omanfyri. Báðar kærunevndirnar eru nevndir undir Føroya Kærustovni.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at minka talið á almennum nevndum og ráðum. Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini og kærunevndin hjá Barsilsskipanina eru tvær nevndir, men hava í høvuðsheitum somu treytir og eru í roynd og veru mannaðar við somu persónum. Tí verður skotið upp at leggja hesar báðar kærunevndirnar saman til eina kærunevnd. Í hesum sambandi verða ásetingarnar um kæru í barsilslógini eisini broyttar.

Av tí at somu persónar manna báðar kærunevndirnar, og setanarskeiðið hjá báðum nevndum er til 1. juni 2021, heldur kærunevndin fram sum higartil, men við broyttum navni.

§ 1, nr. 15
Tað krevur heimild í løgtingslóg, um tað skal vera kravt av borgara ella fyritøku, at tey skulu samskifta við almennar myndugleikar elektroniskt ella talgilt. Í sambandi við menningina av Talgildu Føroyum verður helst neyðugt at hava slíka heimild í ALS-lógini. Tí verður skotið upp, at landsstýrismaðurin fær heimild til at áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi.

§ 1, nr. 16
Í § 29, stk. 1 verður gjørd ein teknisk broyting. Revsingin fyri at geva Arbeiðsloysisskipanini skeivar ella misvísandi upplýsingar sambært lógini verður broytt frá hefti til fongsul upp í fýra mánaðir. Orsøkin til hetta er, at hefti sum revsing ikki er til longur sambært broyting í revsilógini, sum fekk gildi 1. januar 2010. Fongsul í upp til fýra mánaðir er samsvarandi gomlu heftirevsingini. Tað er framvegis møguligt at revsa við sekt.

Til § 2
Stk. 1
Áseting um gildiskomu.

Stk. 2
Ásett er í § 2, stk. 2, at broytingarnar viðvíkjandi eftirløn hava virknað frá 1. januar 2019, tá ið broytingarnar í eftirlønarlógini komu í gildi. Hetta er neyðugt, tí at arbeiðsloysisstuðul í roynd og veru hevur verið eftirlønargevandi síðan 1. januar 2019.

Stk. 3
§ 2, stk. 3 er ein skiftisregla, sum ásetur, hvørji útgjøld úr Arbeiðsloysisskipanini verða roknað samsvarandi hesi løgtingslóg. Í praksis merkir hetta, at broytingarnar í útgjøldunum fáa gildi, tá ið útgjaldsskeið nr. 02/2021 byrjar. Útgjaldsskeið nr. 2 byrjar 11. januar 2021. Orsøkin til hetta er, at ALS ikki fær umsitið fleiri ymiskar útgjaldssatsir í einum og sama útgjaldsskeiði.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 3. november 2020

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: “Uppskot um broytingar av inn- og útgjøldum”, skriv frá stýrinum fyri ALS
Fylgiskjal 3: Hoyringarskriv frá Antares
Fylgiskjal 4: Hoyringarskriv frá Faroe Offshore Service
Fylgiskjal 5: Hoyringarskriv frá Almannaverkinum
Fylgiskjal 6: Hoyringarskriv frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 7: Hoyringarskriv frá Fiskimálaráðnum
Fylgiskjal 8: Hoyringarskriv frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag
Fylgiskjal 9: Hoyringarskriv frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 10: Hoyringarskriv frá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum
Fylgiskjal 11: Hoyringarskriv frá PAM Offshore Service
Fylgiskjal 12: Hoyringarskriv frá Samtak
Fylgiskjal 13: Hoyringarskriv frá Sjóvinnustýrinum/FAS
Fylgiskjal 14: Hoyringarskriv frá Fakfelagssamstarvinum
Fylgiskjal 15: Hoyringarskriv frá Almannamálaráðnum
Fylgiskjal 16: Hoyringarskriv frá Maskinmeistarafelagnum
Fylgiskjal 17: Hoyringarskriv frá Heilsuhjálparafelagnum